# Tær fyrstu um Malju




**Fyrstu tvær væl umtóktu bøkurnar um Malju eru nú komnar**

ÚTGÁVUR
*Turið Kjølbro*

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tvær smábarnabøkur, sum Lucy Cousins hevur skrivað og teknað. Tær eru Malju dámar væl at spæla og Fyrstu klaffabókina hjá Malju. Niels Jákup Thomsen hevur týtt báðar.

Fyrsta klaffabókin hjá Malju er stór, litføgur klaffabók við 36 klaffum. Hyggur tú væl at myndunum og letur klaffarnar upp, lærir tú ymiskt saman við Malju, t.d. um litir, at telja upp í fimm, um skap og um mótsetningar. Bókin er 12 bls. í litum, prentað á haldgott papp og kostar kr. 90.

Malju dámar at spæla er lítil, sniðskorin bók um Malju, sum spælir ymiskt. Hon er ætlað teimum smæstu. Bókin er 16 bls. í litum, prentaðar á haldgott papp. Hon kostar kr. 40.

Hesar bøkurnar um Malju eru bara tær fyrstu í einum rættiligum Malju-roki í heyst til tey minstu. Malja hevur verið at sæð á okkara leiðum á donskum, men nú koma fýra nýggjar søgur á føroyskum. Umframt tær tvær, sum eru umrøddar, fara tvær aðrar at koma út seinni, Malju dámar at koyra og so Á garðinum hjá Malju - ein bók at seta upp og spæla við. Bókadeildin væntar, at børn og vaksin fara at taka væl ímóti Malju.

Lucy Cousins er í dag ein tann kendasti barnabókahøvundurin og teknarin í Onglandi. Við at knýta saman humor, hugflog og einfaldar gerandistilburðir og endurgeva tað í føgrum litum, hevur eydnast henni at koma á tal við børn um allan heimin. Hon hevur teknað og skrivað nógvar smábarnabøkur, men tær kendastu eru bøkurnar um Maisy, á føroyskum Malja. Í dag er Malja vorðin SV-stjørna, og bøkurnar um hana koma úr í fleiri og tjúgu londum.

# Sakni ein landsstýrismann við ambisjónum

**- Fólkaskúlin hevur brúk fyri einum landsstýrismanni við ambisjónum. Áhugin fyri fólkaskúlanum er lítil, og eingin spyr, hvussu hann hevur tað, sigur Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*



*- Hetta valskeiðið er í alt ov stóran mun verið merkt av stórum glæsiligum málum. Skúlin er bara ein smálutur, ein parentes í hesum høpinum, sigur Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hóast støðan viðvíkjandi fígging og kørmum í føroyska fólkaskúlanum í dag er hættislig og ótrygg, og ymiskt, sum er álagt við lóg, ikki ber til at gjøgnumføra vegna vantandi pengar, eigur fólkaskúlin ikki nógvar røddir á løgtingi. Teir fýra fyrispurningarnir, sum hava verið um fólkaskúlan, eigur Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna fyri Javnaðarflokkin.

- Áhugin hjá Mentamálastýrinum fyri fólkaskúlanum er lítil, sigur Katrin Dahl Jakobsen, sum heldur, at landsstýrismaðurin í mentamálum átti í nógv størri mun lurtað eftir skúlafólki.

- Eingin spyr, hvussu skúlin hevur tað. Hjá løgtingsfólki og øðrum við hevði verið áhugavert at fingið at vita nærri, hvussu fólkaskúlin hevur tað kring landið. Hvussu klára ymsu skúlarnir kring landið eitt nú at fylgja við, hvussu stendur til við kunningartøkni á skúlunum, og sum heild at eftirmeta, áðrenn nýggj ting verða sett í verk. Kunningin frá Mentamálastýrinum, hvussu skúlin hevur tað, er alt ov lítil, og tað er sera óheppið, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Tað tænir ivaleyst ikki fólkaskúlanum ella mentamálum yvirhøvur, at fýra landsstýrismenn hava sitið við mentamálum hetta valskeiðið.

- Fólkaskúlin hevur brúk fyri einum landsstýrismanni við ambisjónum. Tað er sera óheppið, at landsstýrissessurin í Mentamálastýrinum verður útskiftur so ofta. Arbeiðið hjá teimum kann aldri vera serliga miðvíst, ei heldur um teir hava nakrar ambisjónir, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Men visjónir hevur landsstýrismaðurin um fólkaskúlanum. Sambært løgmansrøðuni á ólavsøku skal føroyski fólkaskúlin í andgletti komandi ár. Viðurskifti í skúlanum skulu nærlýsast og greinast, og arbeitt verður við, at virksemi og játtan í fólkaskúlanum sampakka betur enn nú.

- Fólkaskúlin hevur veruliga havt tað so ringt í longri tíð, og nú, tá ið tíðin styttist til løgtingsval, skal skúlin í andgletti. Tað virkar ógvuliga løgið fyri mær, at ein slík ætlan kemur so seint í einum valskeiði. Slíkt átti at komið í byrjanini av einum valskeiði, soleiðis at eitthvørt sum kemur burtur úr kann setast í verk í valskeiðnum. Hatta kann ikki verða annað eitt plástur uppá sárið eftir alt rokið um fólkaskúlan, sum hevur verið, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

- Fyri mær sær tað út sum landsstýrið hevur lopið nøkur stig um. Vit tosa um gransking og granskingarráð, og nógvir pengar eru settir av til tað endamálið, meðan fólkaskúlin als ikki verður raðfestur. Gongdin átti at verið tann øvugta, har byrjað verður við skúlagongdini hjá teim smáu. Hetta valskeiðið er eisini í alt ov stóran mun verið merkt av stórum glæsiligum málum. Skúlin er bara ein smálutur, ein parentes í hesum høpinum, og alt kjak uttan mun til hvat endar í kjaki um fullveldi.

# 34 pláss í eygsjón

**Um nakrar mánaðir byrja 34 børn í barnagarðinum hjá Føroya Tele**

DAGSTOVNUR
*Turið Kjølbro*



*Barnagarðurin hjá Føroya Tele*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Barnagarðurin hjá Føroya Tele verður veruleiki fyrst í komandi ári. Fyrst í hesum árinum keypti Føroya Tele sethúsini við Sundveg 3 í Havn. Tey verða nú umvæld og gjørd til barnagarð. Í hesum døgum søkir Tórshavnar kommuna eftir leiðara til stovnin at byrja 1. desember. Ætlanin var annars at stovnurin skuldi lata upp eftir summarsteðgin í ár, men hetta hevur av eini ella aðrari orsøkin ikki verið møguligt.

Stovnurin fer at hýsa 34 børnum undir skúlaaldri. Helmingurin av børnunum vera børn hjá starvsfólki á Føroya Tele. Hini plássini vera latin børnum, sum frammanundan standa á bíðilista hjá Tórshavnar kommunu.

Barnagarðurin hjá Føroya Tele, sum verður skipaður sum sjálvsognarstovnur, er fyrsti av sínum slagi í Føroyum. Føroya Tele hevur leingi havt í umbúna at keypa hús til barnagarð, men hevur havt trupult við at finna eini egnað hús.

ítróttur
Nr. 169 • týsdagur • 3. september 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stríðið kann kosta í morgin

**Allan Simonsen heldur møguleika vera fyri, at vánaligu umstøðurnar leygardagin fara at kennast aftur í annaðkvøld**

TÍÐINDAFUNDUR
*Jóannes Hansen*



*Allan Simonsen hevði rundan dag leygardagin, tá hann fyri 50. ferð stóð á odda fyri føroyska fótbóltslandsliðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sum vera man var venjarin hjá føroyska landsliðnum, Allan Simonsen, væl nøgdur eftir lokið stríð leygarkvøldið.

– Vit kunnu ikki annað enn vera nøgdir við at hava vunnið ein HM undankappingardyst. Umstøðurnar vóru ikki til fótbóltsspæl. Tað var spell, at tað skuldi bera soleiðis á. Meðan vit hava fyrireikað okkum til hendan dystin, hava verður umstøðurnar verið góðar.

Allan Simonsen vildi ikki draga nakran spælara framum nakran annan, men staðfesti, at undir teimum umstøðum, sum vóru, so høvdu allir víst tað, sum roknast kundi við:

– Nú verður uppgávan at fáa møðina úr kroppinum, áðrenn vit mikukvøldið skulu spæla ímóti Russlandi. At vøllurin var so vátur og tungur kann fara at vísa seg at kennast komandi dagarnar. Spælararnir eru ivaleyst móðari, enn teir høvdu verið undir vanligum umstøðum.

*Hví skifti tú Súna Olsen út?*

– Hann var eitt sindur eymur í øðrum lærinum, og so gjørdu vit av at seta Heðin á Lakjuni inn í vinstru síðu.

*Ivaðist tú í at gera onkra aðra útskifting eisini?*

– Kurt Mørkøre hitaði upp, tí vit ætlaðu at seta hann inn í álopið. Vit tosaðu um at seta John Petersen aftur á miðvøllin og so at seta Kurt Mørkøre í plássið hjá honum. Tað gjørdu vit, tí vit hildu, at tað var neyðugt við eitt sindur størri tyngd í brotsteiginum hjá teimum. Men so vísti tað seg sum um, at tað gekk rætta vegin, og tá vit høvdu fingið málið var eingin orsøk at skifta út.

*Hvat var taktiska útgangsstøði?*

– Undir hasum umstøðunum var tað heilt einfalt. Tað ráddi um at syrgja fyri, at bólturin ikki kom í nánd av okkara máli, og at hann var so nær upp at teirra málið, sum tað bar til. Tað var týðuligt, at um eitt mál skuldi koma, so fór tað at vera eftir eina tilvildarliga støðu ella í sambandi við ein deyðbólt, og so ráddi um, at tað gekk fyri seg í rætta endanum.

## Hálvt hundrað ferðir

Dysturin mikukvøldið var tann 50. hjá Allani Simonsen saman við føroyska landsliðnum. Hetta var áttanda ferðin, at føroyingar og Allan Simonsen vunnu. Sjey ferðir hevur tað verið javnt, og 35 ferðir hevur landsliðið tapt, síðani Allan Simonsen í 1994 gjørdist landsliðsvenjari. Málmunurin er 37–117.

Átta umboð fyri pressuna í Luksemborg vóru við í Føroyum, og teir vildu hava Allan Simonsen at siga teimum, um hann fer at halda fram sum landsliðsvenjari. Sáttmálaskeiðið hjá FSF og Allani Simonsen verður lokið, tá síðsti dysturin í HM undankappingini – tað verður í Slovenia leygardagin 6. oktober – er spældur. Men tað vildi Allan ikki svara uppá:

– Vit hava ikki tosað um tann spurningin enn, var svarið, sum væl nøgdi venjarin hjá føroyska liðnum hevði leygarkvøldið.

# Ikki upplivað sovorðið í 16 ár

**Vónbrotni venjarin hjá Luksemborg, Paul Philipp, helt ikki, at veðurlíkindini vóru til at spæla fótbólt leygardagin**

TÍÐINDAFUNDUR
*Jóannes Hansen*



*– Eg havi ongar viðmerkingar til fótbóltsspælið. Tað var einki fótbóltsspæl at síggja, tí umstøðurnar vóru ikki at spæla fótbólt í, staðfesti Paul Philipp eftir dystin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Venjarin hjá Luksemborg hevur verið longri í venjarastarvinum, enn nakar annan landsliðsvenjari í Europa. Hann er ættaður úr Luksemborg, og hann var landsliðsspælari í sjeyti árunum. Síðani 1985 hevur hann verið landsliðsvenjari.

Leygardagin sást hann undir dystinum alla tíðina at veipa við ørmunum og at tosa við fjórða dómaran, tá tað bar til. Tað var týðuligt, at venjarin ikki var nøgdur, og á tíðindafundinum var hann sera vónbrotin:

– Eg havi ongar viðmerkingar til fótbóltsspælið. Tað var einki fótbóltsspæl at síggja, tí umstøðurnar vóru ikki at spæla fótbólt í, staðfesti Paul Philipp, sum síðani tosaði eina rúgvu um veðrið.

Tá Føroyar og Luksemborg 24. mars spældu í Luksemborg, regnaði tað illa, og vøllurin var tungur, men venjarin helt ikki, at veðurumstøðurnar kundu sammetast, og hann segði seg ikki hava verið í sovornum fótbólts ódnarveðrið tey sekstan árini, sum hann hevur verið landsliðsvenjari.

## Langt síðani seinast

Tað var einki at siga til, at venjarin hjá Luksemborg var vónbrotin. Sjálvandi hevði avrikið verið øðrvísi, um veðrið hevði verið øðrvísi, men tað er lítið sannlíkt, at úrslitið hevði verið gestunum meiri til fyrimunar.

Men venjarin hevði vónað og billað sær inn, at tað hesa ferð skuldi eydnast at vinna sigurin, sum hann og hini í Luksemborg hava bíðað eftir síðani 1995.

Í undankappingini til EM endaspælið í Onglandi í 1996 vann Luksemborg tríggjar dystir. Teir vunnu tvær ferðir 1–0 á Malta, og so eydnaðist teimum á heimavølli at vinna 1–0 á Kekkia, sum í EM endaspælinum í Onglandi kom í finaluna, har teir taptu ímóti Týskalandi.

Síðani tá hevur tað ongantíð eydnast Luksemborg at vinna. Tá teir í HM undankappingini komu í bólk saman við Føroyum høvdu teir vónað, at tað aftur skuldi eydnast at vinna. Nú eru báðir dystirnir spældir. Føroyar hava vunnið 2–0 og 1–0, og tað sigur seg sjálvt, at teir í Luksemborg eru vónbrotnir.